Álit

í

løgtingsmáli nr. 80/2020: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um tryggingarvirksemi (Tekning av ávísum sertryggingum í útlendskum tryggingarfeløgum)

Landsstýrismaðurin í umhvørvis- og vinnumálum, Helgi Abrahamsen, hevur lagt málið fram tann 9. februar 2021, og eftir 1. viðgerð tann 18. februar 2021 er tað beint Vinnunevndini.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundi tann 9. og 16. mars 2021.

Undir viðgerðini hevur nevndin havt fund við umboð fyri Tryggingareftirlitið og landsstýrismannin í umhvørvis- og vinnumálum, Helga Abrahamsen.

Lógaruppskotið hevur sum endamál at nøkta ein aktuellan føroyskan tryggingartørv og at gera viðurskiftini lóglig við at lata upp fyri, at tryggingarfeløg úr ES/EBS londum, sum í dag ikki lógliga kunnu reka virksemi í Føroyum, fáa møguleika at tekna nakar sertryggingar, sum tørvur serliga er á, og sum í stóran mun longu verða teknaðar.

Talan er um, at tryggingarfeløg úr ES/EBS londum frítt kunnu tekna hesar sertryggingar í Føroyum: Skrokktrygging av flogførum. Ábyrgdartrygging av flogførum. Ábyrgdartrygging av skipum við einum bruttotonsatali upp á 300 ella meiri – P & I trygging (Protection & Indemnity). Ábyrgdartrygging av flogvøllum (Airport Liability Insurance).

Í hoyringarskrivi til málið vísir tryggingarmeklari á ójavnar kappingartreytir millum meklarafyritøkur og tryggingarfeløg í mun til atgongdina hjá kundunum til at tekna tryggingar uttanlands. Vinnunevndin heitir á landsstýrismannin í vinnumálum at taka henda spurning upp, og tryggja javnsettar kappingartreytir á marknaðinum.

Nevndin setir fram soljóðandi

b r o y t i n g a r u p p s k o t

Í § 1, nr. 2 verður § 36 orðað soleiðis:

“§ 36. Her í landinum er tað ikki loyvt við vinnuligum endamáli at hjálpa til við, at beinleiðis tryggingar hjá persónum, búsitandi í Føroyum, føroysk skip ella aðrir váðar, sum eru í Føroyum, verða teknaðar hjá øðrum enn:
1) føroyskum tryggingarfeløgum,
2) útlendskum tryggingarfeløgum, sum lúka treytirnar í § 22, stk. 1, ella § 23, stk. 1, umframt útlendskum tryggingarfeløgum, sum hava fingið loyvi frá Tryggingareftirlitinum, og
3) tryggingarfeløgum úr ES/EBS londum, ið tekna váða sambært § 1, stk. 9.”

Viðmerkingar
Talan er bert um tekniskar løgfrøðiligar broytingar í § 36. Eingin broyting er í sjálvum innihaldinum.

Við hesi broyting tekur ein samd nevnd tekur undir við málinum og mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

Vinnunevndin, 24. mars 2021

Bjørt Samuelsen formaður	Johan Dahl næstformaður	Bjarni Hammer
Henrik Old	Bjarni Kárason Petersen	Beinir Johannesen
	Jákup Mikkelsen	